gult12 cyan12 magenta12 svart12



# Mótmælisgongan gav úrslit

**Foreldur og børn vístu sunnudagin pørtunum í verkfallinum á ótolandi støðuna, tey hava verið í, nú dagstovnarnir kring landið hava verið afturlatnir**

VERKFALLIÐ
*Turið Kjølbro*

Í tvær vikur hava foreldur, sum hava børn á dagstovni, verið í eini ótolandi støðu. Tey hava verið noydd at funnið alternativar loysnir til ansing av sínum børnum. Nógv foreldur hava skiftst um at verið til arbeiðis og verið heima, nógv børn hava verið hjá ommum og øðrum í familjuni, og aðrar minni tryggar loysnar hava verið funnar. Hetta var ovboðið upp undir vikuskiftið. Foreldraráðið í Sankta Josefs barnagarði í Havn tók tí stig til eina mótmælisgongu sunnudagin. Mótmælisgongan fór úr Kommunuskúlagarðinum oman á Vaglið. Gott og væl hálvt hundrað foreldur og børn vístu í oysregninum pørtunum í verkfallinum á ónøgd sína. Endamálið var eittans: at fáa partarnar í verkfallinum at tosa saman. Gongan var sera friðarlig, hon veitraði til partarnar, sum sótu á Hotel Hafnia og samráddust, og hesir veitraðu aftur.

Um friðarliga mótmælisgongan gjørdi sítt til, at verkfallið fekk ein enda, er óvist. Tey gott og væl 2000 børnini um alt landið, sum ikki eru sloppin í vøggustovu og barnagarð í hálva aðra viku, fegnast óivað. Og ikki minst foreldur teirra. Í dag byrjar vanligi dagurin aftur...



*Friðarliga mótmælisgongan sunnudagin hevði eittans endamál: at fáa partarnar í verkfallinum at tosa saman og koma til eitt úrslit.*
*Mynd: Jan Müller*

## Bankafólk nýggjan sáttmála

SÁTTMÁLI
*Turið Kjølbro*

Uttan luttøku av semingsmonnum er tað eydnast Finansforbundet, Arbeiðsgevarafelagnum hjá Fíggjarstovnum í Føroyum, Starvsfólkafelag Sparikassanna í Føroyum og Elektron at gera ein tvey ára sáttmála galdandi fyri føroysku peningastovnarnar og Elektron. Samlaði fíggjarkarmurin er 9,67 prosent og eins fyri allar sáttmálarnar.

Í tíðindaskrivi siga partarnir í samráðingunum, at vantandi luttøkan av semingsmonnum gjørdi tað møguligt at nýta ein part av fíggjarkarminum til at skapa størri samljóð millum sáttmálarnar og at gera ávísar tillagingar í sáttmálaleistum. Eitt nú eru góð 2 prosent av karminum nýtt til at hækka arbeiðsgevaragoldna eftirlønarprosentið hjá teimum limum, har eftirlønin er lægri enn 10 prosent til útlíkning av arbeiðstíðini og til at broyta lønarbygnaðin.

## Hoyrnardeildin um at drukna í arbeiði

**Einasta serútbúna fólkið á Hoyrnardeildini er ovbyrjað av uppgávum. Felagið fyri Hoyribrekað í Føroyum heitir tí á myndugleikarnar um at fáa viðurskiftini í rættlag sum skjótast**

HOYRIBREK
*Turið Kjølbro*

Vælferðin hjá nógvum hoyribrekaðum í Føroyum er tengd at, at umstøðurnar hjá Hoyrnardeildini eru nøktandi. Tað eru tær ikki í løtuni, og nevndin í Felagnum fyri Hoyribrekað í Føroyum heitir tí á avvarðandi myndugleikar um at síggja til, at hesi viðurskifti koma í rættlag sum skjótast. Ætlanin er at flyta Hoyrnardeildina av Sernámsdeplinum, har hon leingi hevur hildið til, á Landssjúkrahúsið. Flytingin skuldi havt verið fyri hálvum ári síðani, freistin var síðani sett til 1. apríl, men enn er Hoyrnardeildin ikki flutt, og eingin veit í løtuni, nær flytingin verður. Støðan er ótrygg, og hon gerst ikki betri av, at einasta starvsfólkið á Hoyrnardeildini, Ina Wessberg, audiologiassistentur, er um at drukna undir í arbeiði. Umstøðurnar, hon hevur at arbeiða undir, eru alt annað enn eggjandi, slær Felagið fyri Hoyribrekað fast. Arbeiðið er meiri enn til ein persón, audiologiassistenturin hevur ikki so frægt sum ein skrivara afturat sær, og tí má hon røkja fleiri uppgávur samstundis uttan at fáa endurgjald fyri tað. Á Hoyrnardeildini er møguligt at fáa hoyritól tillagað óg útflýggjað, og hagar ber til at venda sær, um tólini verða í ólagi.

Felagið fyri Hoyribrekað í Føroyum hevur júst havt aðalfund. Tey, sum manna nevndina nú eru Nicolina Dahl, Klaksvík, sum er forkvinna, Jákup Danielsen, Havn, kassameistari, Katrin Rubeksen, Havn, skrivari, og Jórun Johannesen, Norðskáli, tiltakslimur.

Limatalið í felagnum er vaksandi, eitt tekin um, at alt fleiri føroyingar fáa eitthvørt hoyribrek at dragast við.

# Foreldur meiri kræsin

**Donsku kommunurnar hava útvegað 100.000 fleiri dagstovnapláss. Men nógv donsk foreldur siga nei takk til eitt stovnspláss um tað ikki lýkur ávísar treytir. Tí er í onkrari kommunu í dag bíðilisti og tøk pláss samstundis**

DAGSTOVNAR
*Turið Kjølbro*



*Foreldur vilja hava ávirkan á, hvar barn teirra verður ansað.*
*Savnsmynd*

Listarnir yvir børn, sum bíða eftir einum dagstovnaplássi í Føroyum, eru langir og vaksa í hvørjum. Ikki bara í Havn, men eisini úti um landið. Kravið frá foreldrum í Føroyum í dag er stovnspláss til øll. Uttan iva ganga nógv ár fyrr enn tørvurin er nøktaður, hóast menningin gongur eitt sindur skjótari tann rætta vegin, síðani kommunurnar yvirtóku dagstovnaøkið.

Í nógvum kommunum í Danmark hava tey í nógv ár arbeitt miðvíst við at útvega øllum børnum eitt stovnspláss. Jyllands Posturin visti nú um dagarnar at siga, at tørvurin á stovnsplássum er við at verða nøktaður. Um ársskiftið stóðu 3300 børn á bíðilista um alt landið, hetta er 2200 færri enn fyri einum ári síðani. Donsku kommunurnar hava útvegað 100.000 fleiri pláss og 222 kommunur, svarandi til 80%, hava so at siga pláss til øll børnini í teirra kommunu.

Men plásstrygd valdast. Foreldur í ikki so fáum kommunum siga nú nei takk til eitt pláss á stovni til síni børn, um viðkomandi stovnur ikki lýkur ávísar treytir. Hetta stendur at lesa í grein í Søndagsavisen fyri stuttum. Tað er kravið hjá kommunum til stóran fleksibilitet, um barnið skal verða fatað av plásstrygdini, sum ger, at nógv foreldur eru farin at ivast. Tey vilja heldur hava ávirkan á, hvar barn teirra verður ansað. Bæði landafrøðilig atlit og námsfrøðilig viðurskifti spæla inn, tá ið foreldur nokta fyri at taka av einum tøkum plássi. Í staðin fyri finna mamman og pápin júst sum fyrr aðrar fyribils loysnir, meðan tey bíða eftir ynskiplássinum í tí dagstovninum, sum stendur ovast á ynskilistanum. Ommur, ungar gentur í húsið, longri farloyvi, og aðrar loysnir verða brúktar til ynskiplássið er tøkt.

Plásstrygd merkir, at foreldur eru noydd at taka til takkar við einum plássi uttan mun til, hvar tað er. Og hóast plásstrygd er veruleiki nógva staðni eftir foreldratrýsti, var bert sjeynda hvørt foreldur til reiðar at lata barn sítt á stovn undir hesum treytum í mars í ár. Hetta hevur ført við sær ta løgnu støðu í onkrum parti av landinum, at har er bíðilisti og tøk pláss samstundis. Greið tekin um størri tilvit um, hvat foreldur ynskja til síni børn.

Seinastu tíggju árini er kostnaðurin av dagstovnunum í Danmark nærum tvífaldaður, úr 13 milliardum í 1990 til góðar 20 milliardir í dag. Kommunurnar hava sostatt raðfest dagstovnaøkið høgt.

– Plásstrygd merkir fyrst og fremst, at kommunur síggja tað sum sína skyldu at útvega nóg mikið av stovnsplássum. Foreldur eru jú upptikin av, hvar tey lata síni børn. Og tað kunnu vera praktisk og námsfrøðilig viðurskifti, sum eisini spæla inn, men tað hava tað altíð verið, sigur Jørgen Goul Andersen, professari á lærda háskúlanum í Aalborg.

Hann heldur, at tað at foreldur siga nei takk til plásstrygd er eitt tekin um, at nú hava tey eitt val ímillum stovnar.

– Í dag bíðar tú kanska í tríggjar mánaðir eftir tí allarbesta, og so finnur tú eina loysn so leingi. Samstundis meti eg, at nøkur óttast fyri at verða snýtt í skipanini, um tey gerast ov fleksibil og vísa, at tey taka til takkar við hvørjum sum helst, sigur hann

gult13 cyan13 magenta13 svart13

# ítróttur

Nr. 100 • týsdagur • 29. mai 2001 • 75. árgangur • www.sosialurin.fo



*Lærið er aftur í ferð við arga Toda, men álopsstjørnan hjá FCK roknar tó við, at hann verður klárur til komandi uppgávurnar*

# Todi er aftur skaddur

**Vøddaskaði í lærinum ger, at FCK álopsmaðurin ikki verður førur fyri at venja saman við liðfeløgunum – í hvussu so er í hesi vikuni**

SKAÐAR
*Jóannes Hansen*

Í síðstu viku var stóra fótbóltssøgan, at Todi Jónsson hevði gjørt av – fyribils í hvussu so er – at gevast á landsliðnum. Tað varð skrivað og tosað nógv um hesa avgerðina og um, hvønn týdning avboðið kann fara at hava fyri landsliðið og kanska Toda sjálvan.

Nú er greitt, at sjálvt um Todi í síðstu viku ikki hevði havt givið avboð til landsliðið, so hevði hann kortini verið noyddur at sent avboð. Orsøkin er tann, at hann í 1–1 dystinum ímóti Lyngby í Parkini sunnudagin varð skaddur.

– Fýra minuttir eftir at eg hevði javnað til 1–1, bað eg um at sleppa av vøllinum. Eg kendi ein sting í lærinum, eftir at eg hevði verið í luftdysti. Eingin ivi var um, at talan um ein vøddaskaða, og so fór eg beinleiðis av vøllinum.

Hevur tú hugsað, hvussu tað hevði verið, um skaðin kom í landsdysti?

– Tað hevði verið ræðuligt. Men nú fingu teir í FCK so at síggja, at skaðar og landsliðið ikki nýtast at hoyra saman, heldur Todi Jónsson, sum sjálvandi harmast um, at hann enn eina ferð er settur uttanfyri.

Men hann vónar inniliga, at hann fer at verða førur fyri at spæla, tá FCK og Brøndby annan sunnudag fara at spæla finalu um DM:

– Í hesi vikuni verði eg noyddur at taka tað róliga. Tað vil siga, at eg verði ikki førur fyri at venja saman við liðfeløgunum. Tað ræður um ikki at leggja ov nógv fyri. Um alt gongur, sum tað skal, so vóni eg, at tað fer at bera til aftur at venja við fullari ferð komandi mánadag.

### Roynir at fyribyrgja

Í Tipsblaðnum síðsta fríggjadag var ein grein um, at nú spælir Todi rættuliga við vøddunum. Søgan er tann, at Todi, fyri at avmarka sannlíkið fyri vøddaskaðum, hevur vant heilt nógv við vektum síðsta árið. Tað hevur havt við sær, at hann er framfarin eini fýra kilo, men Todi sigur sjálvur, at hetta fyrst og fremst sæst aftur í lærvøddunum.

– Jú, eg havi verið nógvar eykatímar í venjingarhølunum. At tað hevur hilnast hampuliga væl á vøllinum, rokni eg avgjørt við kann skrivast á ta kontoina.

Todi sigur seg hava skilt, at áhugin fyri fótbóltsferðini, sum tað í síðstu viku varð lýst við í sambandi við dystin ímóti Brøndby annan sunnudag, hevur verið rættuliga stórur. Eftir nøkrum fáum tímum vóru øll fimmti plássini seld.

– Vónandi verður tað soleiðis, at eg verði førur fyri at spæla annan sunnudag – eisini fyri teimum, sum koma úr Føroyum at fylgja við. Tað hevði sera harmuligt at sitið uttanfyri í tí dystinum. Men um eg ikki hevði havt givið avboð til landsliðið í síðstu viku, so hevði eg verið noyddur at gjørt tað nú. Eg hevði undir ongum umstøðum verið førur fyri at spælt komandi leygardag, heldur Todi Jónsson, sum ynskir vinmonnunum á landsliðnum alt tað besta, tá teir seinni í vikuni fara undir fyrireikingarnar til stóru uppgávurnar ímóti Sveis og Jugoslavia.

# Nógvir spennandi leikarar

**- Eg fati ikki, at donsk feløg ikki sýna Føroyum størri áhuga. Her er hópur av evnaríkum ungum leikarum, og at Todi stendur seg somikið væl í Danmark, átti bara at veri góð reklama í so máta, heldur talentskóti hjá Ajax, sum var í Føroyum í farnu viku**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Áhugin fyri føroyskum fótbóltsleikarunum er vorðin alsamt størri seinnu árini. Onkrir ungir leikarar eru longu farnir av landinum, og tíðum ljóðar eisini, hvussu nógv eygu fylgja við avrikunum hjá einstøkum leikarum.

Aloftast síggja hesu eygu fyrst leikaran, tá hesin umboða Føroyar og onkrum av yngru landsliðunum, og millum annað undir U-16 kappingini, sum varð hildin í fjør, vóru hópur av sonenvdum talentspeidarum at síggja í Gundadali.

### Vendi aftur

Ein teirra, sum vitjaði í fjør, var John Steen Olsen, sum hevur til uppgávu at finna fótbóltsleikarar til væl umtókta fótbóltsakademiið hjá hollendska stórfelagnum, Ajax. Ein fótbóltsskúli, sum hevur klekt somikið navnframar leikarar sum Edgard Davics, Johan Cruyff Patrick Kluivert, Frank Rijkaard og de Boer tvíburðarar, bert fyri at nevna nakrar.

Hósdagin var John so aftur at síggja í Føroyum. Hesa ferð sum áskoðari til seinnu hálvfinaluni millum tey bæði havnarliðini, HB og B36, og hóast hann ikki var komin at hyggja at nøkrum einstøkum leikara, so duldi hann ikki eftir dystin, at hann enn eina ferð var bilsin um tað, sum hann hevði sæð.

- Sum sagt, so var eg her í fjør, og tá var eg avgjørt bilsin um, hvussu høgt støðið hjá føroysku leikarunum var. Eg havi síðani havt nakað av sambandi við Jákup í Stórustovu, og hann helt, at tað kundi verið eitt gott hugskot, um eg eisini sá onkran dyst í bestu deildini.

- Tað er sostatt orsøkin til vitjananina hesaferð, og aftur nú má eg siga, at eg eri bilsin um støðið. Leikferðin í dystinum í dag var sera høg, og á báðum liðum var talan um fleiri tekniskt góðar leikarar, sum kunnu mennast heilt nógv við røttu venjingini.

Spurdur, um tað var nakar einstakur leikari, sum hann hevði bitið merki í hendan dagin, var svarið eitt sindur dragandi, at har vóru fleiri ungir og spennandi leikarar á báðum liðum.

Sum nevnt, so telist fótbóltsskúlin hjá Ajax millum teir bestu í heiminum. Hópur av stórleikarum eru klaktir undir mongu venjingunum, og aloftast hevur tað verið soleiðis, at hesir spælarar eru komnir bláðungir til felagið. Tí kann tað eisini undra eitt sindur, at John sæst hyggja eftir einum dysti í 1. deild, tí aloftast er talan um leikarar, sum ikki hava aldur til vaksnamannafótbólt.

- Jú, tað er rætt, at vit helst royna at fáa leikarar, sum ikki eru eldri enn eini 15-16 ár, tí tá hava vit størst møguleika at menna teir. Er talan hinvegin um evnaríkan leikara, sum er eini 18-19 ár, so hava vit sjálvandi eisini áhuga í hesum.

### Skilir ikki danir

Eftir at hava tosað eitt sindur aftur og fram um ta menning, sum hevur verið í føroyskum fótbólti, fellur prátið aftur inn á leikarar, sum eru farnir, ella fara út um landoddarnar at royna seg. John heldur fyri, at talan í Føroyum er um lutfalsliga nógvar evnaríkar leikarar, men kortini er eitt, sum hann ikki rættiliga dugir at skilja.

- Eg fati ikki, at donsk feløg ikki sýna Føroyum størri áhuga. Her er hópur av evnaríkum ungum leikarum, og at Todi stendur seg somikið væl í Danmark, átti bara at veri góð reklama í so máta. Tí vildi tað verið náttúrligt, um danir í størri mun hugdu hendan vegin, men av onkrari óskiljandi orsøk er hetta so ikki gjørt enn, heldur John Steen Olsen, og sum talentskóti hjá Ajax, átti hann at vita, hvat hann tosar um.